## Bretar selja alilaks sum villlaks

**Bretland:** Heili 15% av laksinum, sum bretar selja og siga er "villur", er alilaksur.

Hetta vísir ein bretsk kanning, sum bretska matvørueftirlitið hevur gjørt.

Kanningin vísir, at bretsk vinnulívsfólk eisini feilmerkja og selja annan aldan fisk sum "villan".

Bretska matvørueftirlitið, FSA, váttar, at feilmerkingar verða gjørdar, har alifiskur verður "dóptur" villur at vera.

FSA sigur, at feilmerktur fiskur bæði verður seldur í supermarknaðum, fiskahandlum, fiskamarknaðunum og í ymiskum serhandlum.

Kanningin hjá matvørueftirlitinum vísir kortini, at flestu fiskaseljarar geva brúkarunum røttu myndina av vøruni, tó ikki allir. (-vilmund)



# Hevur fýra byggisáttmálar

**Tórshavnar Skipasmiðja, sum bæði eigur Skála Skipasmiðju og verkstaðin FJM í Runavík, hevur úr at gera í løtuni – bæði við nýbygging, leingjan og øðrum virksemi, sum feløgini hava í Havn, Skála og Runavík**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tórshavnar Skipasmiðja hevur í løtuni fýra byggisáttmálar, sum felagið er í holt við at fáa frá hondini.

Talan er um bæði supplyskipini, sum Thor letur smíða á Skála Skipasmiðju og tvær tvíkiljur, sum felagið herfyri gjørdi sáttmála við Vestlaks um at smíða.

### Alt í Føroyum

Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, sigur, at skrokkarnir til tvíkiljarnar eisini verða smíðaðir á skipasmiðjuni – og ikki uttanlands, sum okkurt annað felag, ið smíðar tvíkiljur, hevur gjørt.

– Vit eiga alt arbeiði, bæði design og tekningar, umframt at alt arbeiði verður gjørt á skipasmiðjuni.

Hann sigur, at nú supplyskipini verða smíðað á Skála, verða báðar tvíkiljurnar smíðaðar í Havn.

### Latast í november

– Tvíkiljurnar skulu handast longu í november. Tær verða 13 metrar langar, og sáttmálaprísurin fyri báðar bátarnar liggur um slakar 8 miljónir krónur, sigur skipasmiðjustjórin.

Gunnar Mohr sigur, at í løtuni eru ikki aðrir byggisáttmálar í stoypiskeiðini hjá Tórshavnar Skipasmiðju.



*Myndin er tikin, tá Gunnar Mohr og umboð fyri pólsku skipasmiðjuna undirskrivaðu avtaluna um pólsku arbeiðsmegina á Skála í sambandi við sienna byggisáttmálan hjá Thor í Hósvík*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Byggja boripallar í Eggersund

**– Beint í løtuni er einki nýtt sum so, men vit hava nakrar mans í Eggersund, har boripallar verða bygdir. Enn er ikki komið so langt við hesi verkætlan, at hon gevur so nógv til elektrikarar, men vit liggja fram við – bæði her og aðrastaðni – at fáa nýggjar sáttmálar í lag, sigur Gunnar Mohr**

OFFSHORE
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn er einki stórvegis nýtt at frætta um nakran nýggjan sáttmála hjá Pam Offshore í Noregi.

Tað er Tórshavnar Skipasmiðja, sum eigur hetta felag, og tað er Pam Offshore, sum hevur havt teir mongu elektrikararnar í Svøhvitøkinum og í verkætlanini við Orminum Langa.

Nú hesar verkætlanir geva minni arbeiði til arbeiðsmegina, sum føroyska felagið hevur har yviri, hevur dúgliga verið leitað eftir nýggjum sáttmálum, so føroyingar kunnu halda fram at arbeiða í frálandavinnuni.

Gunnar Mohr, stjóri í Pam Offshore, sigur, at felagið fylgir væl við og roynir at fáa í lag munagóðar sáttmálar.

– Beint í løtuni er einki nýtt sum so, men vit hava nakrar mans í Eggersund, har boripallar verða bygdir. Enn er ikki komið so langt við hesi verkætlan, at hon gevur so nógv til elektrikarar, men vit liggja fram við – bæði her og aðrastaðni – at fáa nýggjar sáttmálar í lag, sigur hann.

Í løtuni hevur Pam Offshore einar 30 elektrikarar, sum eru knýttir at ymiskum verkætlanum í Noregi.

## Spøkilsisskip í havnum

**Danmark:** Ein trupulleiki í donskum havnum eru skip, sum eru løgd, men sum eigararnir ikki tora at høggja upp. Kvoturnar eru fluttar á onnur og nýggjari skip, men óvissa ræður um, hvussu verður við hesum kvotum, um gomlu skipini verða høgd upp.

Tí liggja gomul skip, sum eru tikin úr vinnu og misprýða danskar havnir.

ES-fiskivinnukommiserurin, Joe Borg, hevur nú lovað donskum fiskimonnum at taka henda trupulleika upp, so hann kann verða loystur.

Joe Borg var við, tá Danmarks Fiskeriforening helt aðalfund herfyri.

**(-vilmund)**



*Nýggjari skip loysa tey gomlu av, men danir tora ikki at høgga gomlu skipini upp, tí óvist er tá, hvussu verður við kvotunum*

## Glasállur aftur í havið

**Sargassohavið:** Ráðini fyri londini, sum umsita fiskiveiðina í Eystursjónum og Norðsjónum, eru samd um, at í minsta lagi 75% av glasállinum, sum verður veiddur í dag, skal sleppast í havið aftur.

Ráðini meta nevniliga, at um hesi stig ikki verða tikin, verða tað ov fáir állar, sum fara longu leiðina aftur í Sargassohavið at gýta.

**(-vilmund)**

## Laksur til fiskafars

**Svøríki:** Sviar hava brúkt nógvan pening til at byggja laksatrappur, soleiðis at laksur og síl lættari kunnu sleppa niðan í svensku áirnar at gýta.

Men hetta hevur eftir øllum at døma ikki gingið so væl, sum ætlanin var við hesum trappum.

Kanningar vísa, at bert 15% av fiskinum kemur heilskapaður oman aftur á sjógvin.

Restin av fiskinum verður malin til fiskafars í turbinunum, sum sviar hava sett í árirnar.

**(-vilmund)**